# Nýtt eldrasambýli í Norðragøtu



*Her setir Haldóra Ranghamar, bygdaráðsformaður spakan í, og tekur fyrsta flagið omanav fyri eldrasambýlinum í Norðragøtu*

**Mikudagin seinnapartin setti Haldóra Ranghamar, bygdaráðsformaður, fyrsta spakan í fyri útgrevstrinum til eldrasambýli í Norðragøtu**

ELDRARØKT
*Rúna Sivertsen*

Nakað av fólki var samankomið í illfýsna veðrinum mikudagin, tá Halldóra Ranghamar, bygdaráðsformaður setti fyrsta spakan í fyri nýggja eldrasambýlinum, sum kommunan fer at byggja.

Eftir hátíðarløtuna bjóðaði kommunan til ein drekkamunn í dagtilhaldinum fyri eldri við Gøtugjógv.

### Tíggju búpláss

- Vit fáa pláss fyri 10 búfólkum í sambýlinum, sum ætlanin er skal verða liðugt í mai 2004. Í kjallaranum verður tó pláss fyri 6 fólkum aftrat seinni, sigur Haldóra.

Hon sigur, at nakað av kjallaranum verður innrættað beinanvegin til dagtilhald fyri eldri. Í løtuni húsast dagtilhaldið við Gøtugjógv. Har varð boðið til ein drekkamunn eftir hátíðarløtuna mikudagin, og var møguleiki hjá fólki at síggja tekningina av sambýlinum.

Sunnan fyri nýggju býlingaútstykkingina hevur kommunan hevur sett stórt øki av til tey gomlu.

### Øki til útbyggingar

- Vit vildu seta nóg mikið av plássi av beinanveg. Ætlanin er seinni at byggja vardar íbúðir og annað í sambandi við eldraøkið, sigur bygdaráðsformaðurin.

Tað er landið, sum hevur ábyrgdina av starvsfólki til sambýlini, meðan kommunurnar lata bygningar og náttarvaktir til.

Hóast tað í seinastuni hevur verið nakað av rokilsi í sambandi við eldrasambýlið í Klaksvík, so heldur Gøtu kommuna seg ikki aftur í at fara í gongd fyri at fáa pláss fyri teimum eldru í kommununi.

### Í leysari luft

- Fløkjan, sum nú hevur tikið seg upp í samband við eldrasambýlið í Klaksvík, ger, at vit kenna okkum eitt sindur í leysari luft. Men vit vóna, at ein loysn er funnin á tí trupulleikanum, tá okkara stendur klárt at taka í nýtslu, sigur Haldóra Ranghamar at enda við Sosialin.

Í Syðrugøtu hevur røktarheimið í Runavík eina lítla deild, har pláss er fyri um 8-10 fólkum. Í løtuni er Gøtu kommuna við í eini útbygging av røktarheiminum í Runavík, sum gevur rúm fyri 24 røktarplássum aftrat.

Í Gøtu kommunu er nógv virksemi. Kommunan hevur ikki færri enn 28 skrásett partafeløg.



*Haldóra við økið, sum Gøtu kommuna hevur sett av til eldraøki. Her hevur kommunan ætlanir um seinni at byggja vardar íbúðir og annað í samband við tey gomlu*



*Nýggja eldrasambýlið í Norðragøtu, sum teir báðir, Jens Klæmint Jacobsen og Henning Olsen, hava teknað. S/pf Teknistovan heldur til við Gøtugjógv*

PRIX

NR. 31 • FRÍGGJADAGUR • 14. FEBRUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

### Vinningar

Teir 29 bólkarnir og solistarnir kappast nógvar ymiskar vinningar, og fleiri vinningar verða væntandi avdúkaðir næstu tíðina. Millum vinningarnar til finaluna verða hesir:

Ein vika í Lundgaard Studio í Danmark. Vinnarin fær hesa virðisløn.

Rætturin at luttaka í Star Fighters tónleikakappingini, sum verður á Skanderborg Festivalinum. Vinnarin fær hesa virðisløn.

Konsertframførsla á Jelling Festivalinum. Festivalurin ger sjálvur av, hvønn bólk hann vil hava.

Konsertframførsla á Nibe Festivalinum. Festivalurin ger sjálvur av, hvønn bólk hann vil hava.

Konsertframførsla á Listastevnu Føroya. Vinnarin fær hesa virðisløn

Konsertframførsla í kenda spælistaðnum Vega í Keypmannahavn.



*Manningin í Clickhaze heldur, at tey hava fingið sera nógv burtur úr at luttaka í Prix Føroyum. Høvuðsvinningarnir løgdu grundarlagið fyri eini fløguútgávu og lat hurðar upp til danskar festivalar*

*Mynd: Tom Laursen*

# Prixið gevur meira

**Vinningarnir í Prix Føroyum eru vorðnir fleiri og betri, síðani kappingin byrjaði fyri átta árum síðani. Finalubólkarnir fáa alsamt meira burtur úr luttøkuni, og tað er ikki bara vinnarin, sum kann gera sær dælt. Aðrir finalubólkar hava eisini nakað at fara eftir**

VINNARAR
*Eyðun Klakstein*

Tað er hent nógv hesi átta árini, Prix Føroyar hevur verið ein afturvendandi partur av føroyska tónleikalívinum.

Nýggir tónleikarar bjóða seg fram, nýggir bólkar stinga seg upp, nýggj andlit gerast kend og nýggir tónar eru at hoyra.

Tað er eisini nógv størri virði í kappingini nú, enn tað var at byrja við, tá ið talan er um vinningar, og hvat annars kann fáast burtur úr luttøkuni.

Vinningarnir vaksa støðugt – bæði í tali og í dygd. Tríggir danskir tónleikafestivalar skulu hava føroyskar bólkar at spæla í summar, og nú hevur spælistaðið Vega í Keypmannahavn eisini bjóða seg fram við einum vinningi.

Vinnandi bólkurin sleppur í gott danskt studio, og teir vinna eisini møguleikan at spæla á onkrum festivali, men aðrir finalubólkar hava eisini nakað at fara eftir, hóast teir ikki vinna kappingina.

### Ymiskt hvussu tað royndist

Fyrsti vinnarin av Prix Føroyum var bólkurin Moira, og Terji Rasmussen var sangari í hesum bólki.

– Vit vunnu eina konsertferð til Finnlands, og tað var tað. Sjálvandi var hesin vinningurin góður, og tað var hugaligt at fáa eina slíka ferð, men tað er nógv meira at spæla fyri í Prixnum nú, sigur hann.

– Vónandi eru fyrireikararnir eisini vorðnir betur at hjálpa bólkunum ávegis, tí vit saknaðu stundum stuðul, tá ið vit skuldu avstað og skuldu skipa fyri ymiskum.

Moira spældi til festivalin, tey kalla Down by Laituri, sum verður hildin nærindis býnum Turku í Finnlandi. Her spældi Moira fyri eini stórari áhoyrarafjøld, og teir høvdu eisini konsertir aðrastaðni í Finnlandi.

– Tað var ymiskt, hvussu undirtøkan var, har sum vit spældu. Á festivalinum var sera nógv fólk, meðan tað var minni fólk til okkurt annað tiltak, sigur Terji Rasmussen.

Fyriskipararnir av festivalinum vildu hava Moira aftur til Finnlands at spæla, tá skuldi tað vera í Helsinki, og Moira var aftur á ferð í Finnlandi nakað seinni, men meira spurdist ikki burtur úr tí finska.

Seinni gav Moira fløgu út í Føroyum, og teir spældu eisini nógv til dans og konsertir, áðrenn bólkurin gavst fyri nøkrum árum síðani.

### Fingu nógv burtur úr

Seinasti vinnarin av Prix Føroyum var Clickhaze, og tey halda seg hava fingið sera nógv burtur úr sigrinum.

– Vit fingu sera nógv burtur úr luttøkuni í Prix Føroyum. Hurðarnar vórðu latnar upp til danskar festivalar, og vit løgdu grundarlagið undir okkara fløgu í Lundgaard Studios, sum var ein av vinningunum, sigur Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze.

Nibe Festivalurin vildi hava Clickhaze at spæla hjá sær, og tað hevði síðani við sær, at bólkurin varð biðin aftur til hendan festivalin og slapp til aðrar festivalar í Danmark.

– At vit høvdu spælt í Nibe var ein av orsøkunum til, at vit eisini sluppu at spæla í Roskilde og á Midtfyn í fjør, heldur Jón Tyril.

Hann sigur, at bólkurin hevur fingið sera góð hjálp frá fyrireikarunum av Prixnum, eftir at kappingin var av.

– Prix Føroyar er ein góður møguleiki hjá føroyskum bólkum at sleppa uttanlands at spæla, og tað er ikki bara vinnarin, sum hevur møguleikan til tað. Festivalarnir kunnu jú velja sær júst tann finalubólkin, sum teimum dámar best. Tað vísti seg eisini, at Týr fekk sera nógv burtur úr Prix Føroyum, hóast teir ikki vunnu kappingina, sigur Jón Tyril.